## Oddagrein



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

# EIGA AT MØTA TIL ARBEIÐIS

**S***o illa skulka tingfólk.* Hetta var stóra yvirskriftin hjá Sosialinum mikudagin, eftir at blaðið hevur kannað eftir, hvussu uppmøtingin hjá ting- og landsstýrisfólki hevur verið hesa tingsetuna.

Á fremsti plássi er Marjus Dam, tingmaður Sambandsfloksins. Hann hevur ikki møtt á 22 av teimum 92 tingfundunum, sum merkir, at hann hevur eina fráveru upp á 23,9%. Hevði hann verið ein miðnámsskúlanæmingur, so varð hann langt síðani tveittur á dyr fyri ringa uppmøting. Onnur tingfólk koma honum á baki við hesum ivasama heiðuri, harímillum bæði fólkatingsmenn og floksformenn.

Tað kann kanska virka smáligt at gera upp, hvussu uppmøtingin hjá tingfólki er. Men tó. Løgtingið er stovnurin, sum vit seta at taka avgerðir okkara vegna. Fólkið velur tey 33 fólkini, sum í ymsum politiskum flokkum skulu taka skilagóðar avgerðir. Tí er tað minsta, vit kunnu krevja, at tey sýna so frægt av respekt, at tey møta til arbeiðis. Hvør annar arbeiðsgevari hevði funnið seg í, at starvsfólk vóru burtur frá arbeiði ein dag hvørja einastu viku?

Men hetta sigur kanska nakað um arbeiðslagið í løgtinginum. Vit funnust í eini oddagrein herfyri at tingfólki, sum ikki eingong møttu upp til arbeiðis at atkvøða sítt egna uppskot um misálit á løgmann ígjøgnum. Slíkt vísir totala vanvirðing fyri tingarbeiðinum – har løgtingið brúkar ein heilan seinnapart upp á at viðgera eitt misálitisuppskot, sum í besta fall ikki var meint í álvara. Og at vinstra hond ikki veit, hvat høgra ger, var aftur sjón fyri søgn mikudagin. Løgtingið gjørdi av ikki at játta pengar til veðurtíðindi.

Fyri tveimum árum síðani yvirtóku vit veðurtænastuna frá dønum. Nú skuldu vit hava føroysk veðurtíðindi. Ein fyribils avtala varð gjørdi við DMI um at røkja tænastuna fyri okkum móti gjaldi – og nú hevur okkara høga parlament gjørt av, at hetta hava vit ikki



ráð til longur. Er hetta yvirtøkupolitikkurin hjá landsstýrinum: At yvirtaka tænastur frá dønum fyri at leggja tær niður?

### »Yvirtaka tænastur fyri at leggja tær niður

Vit kunnu av røttum spyrja, um tingfólk taka sítt arbeiða í álvara, um tey eru kompetent til sítt arbeiði, ella um politiska handalagið bara er so vánaligt í løgtinginum og í landsstýrinum, at slíkt kann henda. Hetta er neyvan ein spurningur um pengar.

Tað hvílir stór ábrygd á politisku flokkunum og leiðslum teirra. Tað minsta; vit krevja, er at eitt sindur av skili er í. Ein máti at røkka hesum, er at tingfólk møta til arbeiðis.

## Væntaði okkurt vánaligt ummæli

Tá ið Eivør Pálsdóttir herfyri hevði konsert í Vega í Keypmannahavn, fekk hon eitt óvanliga kritiskt ummæli í tíðarritinum Gaffa, sum annars mangan hevur hálovað føroysku songkvinnuni.

Nú Eivør hevði eina munandi meira rockkenda framførslu, enn hon plagar at hava, vendi tummilin niður hjá Gaffa. Ummælarin helt millum annað, at Eivør tóktst óektað og pátikin.

– Tað var eitt sindur óheppið at fáa slíkt ummæli, men eg hevði í grundini innstillað meg upp á, at eg kundi fáa okkurt slíkt ummæli. Tá ið tú skiftir stíl so drastiskt, so eru tað ikki øll, sum eru so glað fyri tað, sigur Eivør Pálsdóttir.

– Hasin ummælarin er frá Tønder og dámar væl fólkatónleik, so eg skilji væl, at hann hevur fingið eitt sjokk. Tað einasta, eg kann gera, er ikki at taka tað ov nær, sigur Eivør.



### »»Fólksins rødd« ikki bara vanlig fólk

GUNNHILD DAHL NICLASEN
KJAK Á SÍÐU 13



## Brad Pitt sum Blomkvist



Bøkurnar og filmarnir um Lisbeth Salander og Kalle Blomkvist eru størsta norðurlenska succes av sínum slagi, og nú skal fyrsta bókin í røðini hjá Stieg Larsson gerast til film í USA.

Har verður ófort tosað um, hvør skal spæla teir týðandi leiklutirnar í filminum.

Entertainment Weekly skrivar nú um dagarnar, at sjálvasti Brad Pitt hevur fingið tilboðið um at spæla mannliga høvuðsleiklutin í filminum – journalisturin Kalle Blomkvist.

Leikstjórin David Fincher hevur áður samstarvað við Brad Pitt, og hann hevur boðið Brad Pitt leiklutin.

Sambært blaðnum The Sun eru Carey Mulligan og Kristen Stewart favorittar til at fáa leiklutin sum Lisbeth Salander.



### »Fólkaatkvøða um vallógina

HELENA DAM Á NEYSTABØ
KJAK Á SÍÐU 14

## Øgiligt ekkó skal basast

Leygarkvøldið verður stóra stuðulskonsertin í Saltsiloini á Drelnesi. Nógv av fremstu nøvnunum innan føroyskan tónleik fara at spæla til tiltakið. Teirra millum eru Eivør Pálsdóttir, Teitur Lassen, Frændur, Brandur Enni og Jens Marni Hansen.

Stóra rúmið í Saltsiloini hevur eitt ekkó, sum vil nakað. Tosað verður um, at tað ekkóar í eini seks sekund, og tað er ikki júst tað optimala til eina konsert við rútmiskum tónleiki. Fyrireikararnir royna tó at gera ymiskt við ljóðteppum, sum kann avmarkað ekkóið eitt sindur.

Konsertin í Saltsiloini á Drelnesi byrjar leygarkvøldið kl. 18.30, og hon heldur fram at alt kvøldið og endar tíðliga á náttini.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*